# EB/STREYMUR STEYPAVINNARI 2010



## Tiger Woods í andróðri

Seinasta árið hevur amerikanski golf spælarin Tiger Woods av sonnum verið í andróðri, og nú sær tað út til at ávirka spælið hjá honum eisini. Í vikuskiftinum var Woods við í golf kapping, nevnd Bridgestone Invitational, har hann gjørdist nummar 78 av 80 spælarum. Tiger Woods hevur áður staðið seg sera væl í Bridgestone Invitational. Eitt nú hevur hann vunnið kappingina heili sjey ferðir, og hansara ringasta úrslit á Firestone Country Club vøllinum, er eitt deilt fimta plássi. Tað vil siga inntil síðsta vikuskiftinum. Vánaligu úrslitini hjá Tiger Woods seinastu tíðina, kunnu hava við sær at hann missir fyrsta plássið á altjóða styrkislistanum í golf. Eitt sæti sum Woods hevur havt í heilar 269 vikur á rað, ella yvir fimm ár. Um Phil Mickelson endar á fjórða plássi í Bridgestone Invitational, so fer hann fram við Tiger Woods á styrkislistanum. Mickelson liggur í løtuni á øðrum plássi, eitt slag aftanfyri Goosen úr Suður Afrika

**Sorin Anghel:**

# -Eg eri ikki "matchvinnari"

-Sjálvt um eg skori einasta málið í dystinum, so eri eg ikki "match-vinnari". Vit vunnu steypafinaluna sum eitt lið, og ikki sum einstaklingar, segði ein lítillátin Sorin Anghel eftir dystin.

Sorin Anghel metti ikki at tað var stórur munur á liðunum, men at royndirnar komu sundalagsmonnum til góðar í steypafinaluni. Hetta var fjórða steypafinalan hjá EB/Streymi, og sambært Sorin vóru tað hesar royndir, sum gjørdu útslagið.




-ÍF spældi væl, meðan vit ikki rættuliga fingu glið á okkara spæl. Men tá alt kemur til alt, so vinna vit 1-0, og tað er tað sum hevur týdning, segði málskjúttin hjá sundalagsmonnum.

Sundalagsmenn taptu steypafinaluna í fjør, tá Víkingur vann 3-2, og sambært Sorin Anghel hevur eisini nógv verið tosað í sundalagnum um finalutapið í fjør.

-Vit tosaðu nógv um tapið í steypafinaluni í fjør, og vildu fyri alt í verðini ikki standa í somu støðu aftur í ár. Tað ráddi um hjá okkum at standa væl sum lið, og stríðast fyri hvørjum øðrum, og tað eydnaðist væl, segði ein sera fegin Sorin Anghel at enda.

**Egil á Bø:**

# -Ikki tungt at lyfta løgmanssteypið



Fyri triðju ferð, seinastu fýra árini, kundi liðformaðurin hjá sundalagsmonnum, Egil á Bø, lyfta løgmanssteypið upp í loft, eftir at hava vunnið steypafinaluna.

-Tað kennist fantastiskt at lyfta steypið, og tann kenslan gerst ikki minni av tí, at talan er um triðju ferð, sigur liðformaðurin hjá sundalagsmonnum, Egil á Bø, og leggur skentandi afturat, - at tað ikki er blivið tyngri við árunum at lyfta løgmanssteypið.

-Karmarnir runt um steypafinaluna vóru sera góðar og saman við einari stórari og lívligari áskoðarafjøld, vóru karmarnir til steypafinaluna í topp. segði ein fegin Egil á Bø.

-Sjálvandi hevði eg nervar undan dystinum, men tað er blivið lættari við árunum at hava stýr á nervunum, og brúka tað til nakað jaligt.

Spurdur um dystargongdina, sigur Egil at talan var um ein javnan og rótutan dyst, har tað sást at nógv stóð uppá spæl hjá báðum liðunum. Av tí sama gjørdist tað trupult hjá báðum liðunum at fáa skil uppá spælið. Somuleiðis metti Egil at teir høvdu rímiliga gott tak á fuglfirðingum allan dystin.

**Hans Pauli Samuelsen:**

# -Vit eru góðir við steypakappingina

-Tað kennist fantastiskt at vinna steypakappingina, segði ein fegin Hans Pauli Samuelsen í samrøðu við Sosialin, eftir at EB/Streymur hevði vunnið kappingina um løgmanssteypið fyri triðju ferð seinastu fýra árini.

Spurdur um serstaka sambandið millum sundalagsmenn og kappingina um løgmanssteypið, sigur Hans Pauli, at teir kanska eru eyka tendraðir til steypadystir. Talan er um "vinn ella forsvinn" dystir, og vit hava royndir í tílíkum dystum.



Hans Pauli Samuelsen metur at júst royndirnar hjá sundalagsmonnum í steypafinaluni høvdu týdning fyri dystin.

-Talan var um ein javnan dyst, har bæði liðini komu fram til kjansir, men munurin vóru kaldari í avgerðandi løtu, og skoraðu einasta málið í dystinum. Tað vóru nokk royndirnar hjá okkum í tílíkum dystum, sum gjørdu útslagið, segði Hans Pauli Samuelsen.

-Vit eru góðir við steypakappingina, segði ein sera fegin Hans Pauli Samuelsen at enda, og sipar til góðu úrtøkuna í kappingini seinastu árini.

**Bartal Eliasen:**

# -Hetta var súrt

Tað var ein sera vónsvikin Bartal Eliasen, sum eftir dystin mátti ásanna, at tað heldur ikki hesferð eydnaðist fuglfirðingum at vinna steypakappingina.



Fuglfirðingar vóru í steypafinaluni fyri triðju ferð, og aftur hesferð gjørdust teir ov stuttir.

-Tað kennist øðiliga súrt, at standa her við silvurkrónunum eftir at hava spælt eina steypafinalu, sum vit gott kundu vunnið. Eg haldi at vit vóru minst líka góðir sum EB/Streymur. Vit komu fram til fleiri góðar kjansir. Men kláraðu ikki at umseta kjansir til mál, meðan teir skora uppá ein av sínu fáu kjansum, og tí vinna teir dystin, segði ein sera vónsvikin Bartal Eliasen eftir dystin.

-Eg haldi ikki at manglandi royndir í tílíkum dystum kostaði okkum sigurin. Vit vóru uppsettir, og vístu stóran part av dystinum gott fótbóltspæl. Somuleiðis komur vit fram til fleiri góðar kjansir, men neyvleikin manglaði í avgerðandi løtum. Tað var stong úr hjá okkum, segði ein vónsvikin Bartal Eliasen at enda.